# Heilsanir



**Tøkk**
Hjartaliga takka vit øllum teimum, sum á ymiskan hátt gleddu okkum og veittu eina hjálpandi hond, tá vit høvdu diamantbrúdleyp 28. okt. 2010.
Eini gleðilig jól og eitt av Harranum signað nýggjár ynskja vit skyldfólki, vinum og kenningum.
**Mása og Jógvan Tróndheim**



**Góða elskaða Barbara**
Lukku og gleði á tínum 6 ára føðingardegi 20. des. Omma og abbi elska teg. Jesus pápi signi teg.
**Heilsan omma og abbi við Marknagilsvegin**



**Góða elskaða Rakul**
Hjartaliga tillukku á tínum 8 ára føðingardegi 17. des. Omma og abbi elska teg. Jesus pápi signi teg.
**Heilsan omma og abbi við Marknagilsvegin**



Eg og foreldur míni vilja takka øllum tykkum sum gleddu meg á konfirmatións-degnum 28. mars 2010.
Við ynskjum um eini gleðilig jól eitt gott nýggjár.
**Bestu heilsanir Unnur Egilsnes Hansen, Vestmanna**




**Takk**
Hjartaliga takka við tykkum, sum árla á morgni vaktu okkum við sangi. Tykkum sum løgdu leiðina "suður um fjørð" og tykkum fastbúgvandi. Alt hetta var við til at gera okkara gullbrúdleypsdag so hugnaligan og minnisríkan. Tøkk fyri gávur, blómur, hjálp og heilsanir á okkara stóra degi.
**Poula og Kári Hammer**



**Petur og Klára**
Desember er ein góð tíð, tá fáa tit nógvar gávur. Í morgin halda vit føðingardag hjá Kláru, sum fyllir eitt ár 18. og Petur, sum fyllir seks ár 21. des. Hjartaliga tillukku, tit bæði
**Ynskir abbi**



**Góða fitta Silja**
Hjartaliga tillukku við 1 ára føðingardegnum 18. des.
Jesus pápi signið framtíð tína.
**Nógvir mussar og klemm frá ommu, abba og fastir í Gundadali**



**Góði Reiðar**
Eitt stórt tillukku við 18 ára degnum leygardagin 18. des. Nú er ein blivin vaksin :))
**Klemm frá mammu og Heðin**








**Góði elskaði Rógvi**
Hjartaliga tillukku við 30 ára degnum, sum var tann 11. des. Hopi tú fart ein góðan og hugnaligan dag leygardagin.
**xox Kona tín**